

# Vit leita eftir góðum viðleikara

## Fíggjarmálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til Lønardeildina

Ert tú royndur løgfrøðingur og vilt spesialisera teg í arbeiðsrætti? Ella ert tú nýliga útbúgvin og ynskir tær eina góða barlast á yrkisleiðini? So hevur tú møguleikan á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum.

Sum løgfrøðingur hjá okkum fært tú spennandi uppgávur og mennir tíni fakligu og menniskjaligu evni. Tú kemur tætt at politiska myndugleikanum, fært ein fjølbroyttan arbeiðsdag, sum tú lutvíst kanst skipa eftir egnum tykki, og tú fært eitt arbeiðspláss, sum hugsar um framtíð tína og gevur tær góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving.

**FØRLEIKAR**
Tú dugir væl at orða teg, bæði munnliga og skrivliga, dugir at grundgeva fyri tínum hugsanum og at lurta eftir øðrum sjónarmiðum. Tær dámar at hava nógv um at vera, tú hevur eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, og fyrimunur er at kenna til samráðingar, eitt nú úr fakfelagsarbeiði.

**ARBEIÐSØKIÐ**
Arbeiðsøkið fevnir rættiliga víða. Tú verður við til sáttmálasamráðingar, við til at harmonisera almennu sáttmálarnar, og tú fert at fyrireika felags lønarskipan hjá landinum, gera starvsfólkahandbók og fremja felags avtalur við fakfeløg um t.d. førleikamenning og starvsfólkapolitikk. Vanlig málsviðgerð verður eisini, eins og tú fert at ráðgeva øðrum stjórnarráðum í starvsfólkamálum.

**SETANARTREYTIR**
Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, (BLF). Setanarøkið er alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovan og hini stjórnarráðini.

*Freistin at søkja er 19. desember 2007. Starvið verður sett sum skjótast, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum.*

*Vilt tú vita meira, ring til Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini, tlf. 35 22 00. Sí eisini www.lnd.fo.*

*Umsóknir við prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum skulu sendast til: Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin, Postboks 2039, 165 Argir.*

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

REPROZ

# Eftirløn er einki at bíða við

Tað er lætt at rokna, hvat tú fært útgoldið í eftirløn. Setur tú null inn, fært tú null út. Men stovnar tú eftirløn í dag, fært tú hægstu innlánsrentu bankans, skattavinning og at enda eitt stórt útgjald, tá tú ert vorðin 60.

Á foroya.fo kanst tú rokna tína eftirløn. Tosa við okkum, og vit hjálpa tær at finna rætta inngjaldið og bestu møguleikarnar fyri størri avkasti. Eftirløn er einki at bíða við.

0
+0
=0

FØROYABANKI

REPROZ